## Silkeborg tapti

Føroyski landsliðsspælarin, Christian Lamhauge Holst og liðfelagarnir í Silkeborg tóku ímóti SønderjyskE í donsku SAS-liguni í gjár. Christian Lamhauge Holst og liðfelagarnir máttu lúta 1-2, hóast Silkeborg var á odda 1-0 í steðginum. Rajko Lekic legði Silkeborg á odda, tá 36 minuttir vóru farnir, men í seinna hálvleiki skoraðu Andrei Sidorenkov og Kenneth Fabricius fyri SønderjyskE, so Silkeborg stóð eftir við ongum. Tað eydnaðist SønderjyskE at temja kreativu spælarnar hjá Silkeborg, Jesper Bech og Christian Lamhauge Holst. Føroyski landsliðsspælarin var skiftur út, tá 77 minuttir vóru farnir av dystinum. Silkeborg hevur nú 23 stig fyri 16 dystir. 8 stig eru upp til europeisku plássini, meðan 15 stig eru niður til niðurflytingarplássini.



## Føroyar eru framvegis í niðasta styrkisbólkinum hjá UEFA

UEFA hevur kunngjørt nýggjastu styrkismetingina í samband við EM2012, og eru Føroyar framvegis í niðasta bólkinum saman við Andorra, Aserbadjan, Luksemborg, Malta og San Marino. Sostatt var sigurin móti Litava ikki nokk til at lyfta Føroyar úr tí niðasta bólkinum. Tað eru seks bólkar, og Danmark og Svøríki eru bæði styrkismett í næstovasta bólkinum. Noreg og Finnland eru í bólki trý og Ísland er í bólki fimm, meðan vit eru í bólki seks. Eysturríki, sum Føroyar spældu javnleik 1-1 móti í fjør, eru í triðja bólkinum. Í ovasta bólkinum eru Frakland, Holland, Italia, Ongland, Portugal, Russland, Spania og so er Kroatia eisini aftur við í tí fína selskapinum.

# Akkurát fyri ein javnleik

**Eftir framúrskarandi sigurin á Lettlandi, rakk avrikið hjá U21-landsliðnum leygardagin ikki til meira enn ein 1-1 javnleik ímóti Andorra, sum undan hesum dystinum hvørki hevði fingið mál ella stig. Men eftir stendur, at Føroyar í tveimum útidystum fingu fýra stig, sum er sera góð úrtøka**



einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen



Føroyska liðið, sum byrjaði dystin í Andorra leygardagin. Aftast frá vinstru: Christian Restorff Mouritsen (liðformaður), Pól Jóhannus Justinussen, Dánjal Davidsen, Øssur Dalbúð, Jóan Símun Edmundsson og Rógvi Holm. Fremst frá vinstru: Bogi Løkin, Finnur Justinussen, Jóan Pauli Dahl Jakobsen, Kristoffur Jakobsen og Jóhan Troest Davidsen

Mynd: Fótbóltssambandið

Vónirnar vóru góðar undan dystinum leygardagin á Estadi Comunal í andorianska høvuðsstaðnum, Andorra La Vella. Mótstøðuliðið hevði ikki havt tær stóru royndirnar og slett ikki havt nøkur líkinda úrslit í sínum dystum, og enn átti Andorra á at fáa so mikið sum eitt mál í einum av sínum dystum.

Fyri fyrstu ferð nakrantíð var okkara U21-landslið favorittur í einum undankappingardysti, tí okkara menn høvdu mikudagin flutt stigaúrtøkuna upp á sjey stig, eftir at teir í Riga gjørdu bart og vunnu 1-0 á Lettlandi, sum annars hevði ligið og lúrt uppá at sleppa upp í part frammi hjá Russlandi og Rumenia, sum nú eru lang á odda í bólkinum.

Um tað var drúgva ferðin úr Lettlandi, ið við tveimum flogferðum og einari langari bussferð tilsamans tók tað nógva av einum samdøgri, ella tað var møðin frá dystinum í Lettlandi, sum sat í kroppinum, ella tað var vánaligi vøllurin í Andorra, ið ikki gav møguleikar fyri góðum samanspæli, ella tað var okkurt heilt annað – í øllum førum riggaði tað bara ikki.

### Vánaligur dystur

Gamani, stríddust andorianska spælararnir manniliga og gjørdu vóna, at teir ímóti einari aðrari smátjóð í europeiskum høpi kundu fáa okkurt burturúr, men tað, sum nokk hevði størst ávirkan á vantandi føroyska úrslitið í dystinum, var sjálvt avrikið, sum bara ikki var nøktandi.

Dysturin var sum heild ikki serliga hendingarríkur ella áhugaverdur, og talan var heldur ikki um teir nógvu og stóru málmøguleikarnar. Liðini høvdu eini fimm ella seks skot upp á mál í part, sum tó øll vóru innan fyri málkarmin, men tá vórðu eisini tey tald við, ið málverjarnir næstan kundu tikið blundandi…

Føroysku spælararnir trivust slett ikki á vøllinum, sum var smalur og knortlutur, og serliga vantandi dygdin á grasinum gjørdi, at sum dystinum leið, var bólturin minni og minni spældur á miðvøllinum, men heldur lossaður úr einum enda í annan. Her bleiv meira sparkað enn spælt!

### Væl spæld mál

Undantakið vóru tey bæði málini, og tá Føroyar løgdu seg á odda eftir spæl í góðan hálvan tíma, var tað ein langur solotúrur hjá Pól Jóhannusi Justinussen, ið legði lunnarnar. Í Estlandi var tað høgri bakkur, ið legði upp til málið, og hesa ferð var tað so vinstri bakkur, ið stormaði allan vegin fram ígjøgnum síðuna, samstundis sum hann slapp fram við einum fyri og øðrum eftir av andoriansku spælarunum.

Tá einir tríggir ella fýra vóru rundaðir, legði Pól Jóhannus bóltin hegnisliga inn í brotsteigin, har Jóan Símun Edmundsson enn eina ferð var á blettinum í rættari tíð og á røttum stað, og hann smekkaði bóltin flott í málið hjá Andorra, so Føroyar – eftir ætlan og vónum – vóru á odda 1-0.

Støðan helt sær líka til hálvleiks og eina løtu inn í seinna hálvleik, tá tað gjørdist David Madeira hjá vertunum, ið slapp at fara sín túr. Ein føroyskur bóltmissur frammarlaga á vøllinum var orsøkin til, at



Jóan Símun Edmundsson (uttast vinstrumegin) hevur lagt Føroyar á odda 1-0 ímóti Andorra, men leiðslan helt sær tíverri ikki

Mynd: Fótbóltssambandið